# Nøvn

## Klæmint Skarðhamar 60

Týsdagin 30. november verður Klæmint Skarðhamar 60 ár.

Leygarkvøldið heldur Klæmint Skarðhamar stóran 60 ára føðingardag í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Klæmint er sonur til Sven og Almu Skarðhamar, Sven er sonur skiparan Clement Clementsen, ættaður av Syðradali á Kalsoynni, og Ragnhild Clementsen (fødd Johannesen) ættað úr Havn,

Alma er av Hvítanesi á Streymoynni, dóttir Christian Djurhuus av Selatrað, og Jovinu Nybo av Hvítanesi.

Klæmint er føddur og uppvaksin við Landavegin í Havn, ella rættari sagt í "Kinabrekkuni". Barndómsheimið hjá honum er eisini mítt barndómsheim, tí har eri eg føddur og uppvaksin.

Klæmint er útbúgvin bilmekanikari og stóð í læru hjá Óla Arge, seinni Auto Service, har hann starvaðist í nøkur ár, til hann fór á maskinistskúla. Síðan fór hann at arbeiða sum verkførari hjá Noma-Tek, har hann starvaðist í nógv ár. Nú rekur hann saman við konuni Oddvør, matfyritøkuna Sp/f Oddvør, sum er kend fyri góðan mat.

Vit í Herborg vilja ynskja Klæmint við familju eitt gott kvøld.

**Heðin og Thyra Skarðhamar**

## Italobrothers í Mentanarhúsinum

Leygarkvøldið 27. november kemur heimskendi bólkurin Italobrothers til landið at hava stóra konsert.

ItaloBrothers er ein dance tónleikabólkur úr Týsklandi, sum er sera vælumtóktur, serliga ímillum tey ungu - eisini í Føroyum.

Vit kenna Italobrothers við hittum sum »Stamp on the ground« og »Love is on fire« og cover lagið »Moonlight Shadow«.

Teir hava verið nógv spældir í útvarpi og sjónvarpi og á dansistøðum runt um í heiminum, siga fyrireikararnir.

Konsertin verður hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, har eisini verður skipað fyri DJ-Show við DJ-K1 og DJ-X.

## Koyrilærarafelagið nýtt búmerki

Koyrilærarafelagið hevur fingið nýtt búmerki. Búmerkið er millum annað ætlað limunum at nýta í sambandi við teirra marknaðarføring og er eisini gjørt fyri at gera koyrilærarafelagið meira eyðkent.

Búmerkið myndar eina ketu, sum er ímynd fyri samanhaldi. Samstundis er kjarnan miðjuni ímynd av álvarsemi – og ferðslufrálæran í miðdeplinum.

## »Tá maðurin og pápin er sjómaður«

Týskvøldið 30. november kl. 19.30, skipar sjómanskvinnuringurin fyri einum hugnakvøldið í missiónshúsinum á Toftum við heitinum:

»Tá maðurin og pápin er sjómaður«.

Sjómanskvinnuringarnir í Rituvík, Runavík og Søldarfirði eru bodnir við.

Rannvá á Royðitoft fer at siga frá tí avbjóðing tað er, tá maðurin og pápin hjá børnunum er sjómaður, og heimanífrá stóran part av árinum.

Rannvá kennir væl til sjólívið "heima við hús"

Pápi hennara var sjómaður. Tá hon hitti Eiler var hann sjómaður og hevur verið sjómaður øll árini tey hava verið gift.



Rannvá kemur at siga frá hvussu hon sum barn og ung upplivdi, at pápin var sjómaður, hvussu hon sum kona og mamma hevur upplivað at vera sjómanskona, og hvussu hon, sum mamma upplivdi at hava sonin á sjónum.

Møguleiki verður fyri at seta Rannvá spurningar.

Felagssangur verður eisini á skránni.

Eitt kór við sjómanskonum kemur at syngja. Tað er eitt "spontant" kór, har allar sjómanskonur eru vælkomnar at syngja við.

Vant verður í missiónshúsinum á Toftum sunnukvøldið 28 nov. kl.21.

Hóast tað eru kvinnurnar, sum skipa fyri kvøldinum, eru øll vælkomin.

Hugnakvøldið endar við einum góðum drekkamunni.

## Familjudagur og cafékvøld í Vágum

Leygardagin 27. november fara fólk í Vágum at skipa fyri tiltøkum til frama fyri »í menniskjum góður tokki«.

Byrjað verður kl 15.00 í Bygdaskúlanum í Miðvági, har skipað verður fyri familjudegi við smákøkutombola og loppumarknaði við leikum. Smákøkurnar hava kvinnur í allari oynni bakað og leikurnar eru frá børnum í oynni.

Annlis Bjarkamar kemur at greiða frá tiltakinum.

Sunnudagsskúlabørn fara at syngja og Nomi og Bjarta fara eisini at syngja fyri gestunum. Jólamaðurin og jólakonan koma á gátt at hoyra, hvat børnini ynskja sær í ár og kanska siga onkra søgu.



Drekkamunnur og saft við heitum vaflum og øllum tilhoyri verða at fáa.

Tað kemur at kosta kr. 20,00 at koma inn, børn undir 7 ár ókeypis. Atgongumerkini eru samstundis lutaseðil, har ein kann vinna gávur ella gávukort, sum handlar í oynni hava latið.

Peningurin sum inn kemur, verður latin óskerdur til "í menniskjum góður tokki".

Sama kvøld kl 19.00 verður Cafékvøld í Bygdarhúsinum í Miðvági við fyrilestri, tónleikaframførðslum, skemti, felagssangi og onkrum góðum undir tonnina.

Tey sum koma at luttaka eru:

Hugleiðingar við Jens Eli Ellefsen um Gudmund Bruun, Rasmus Rasmussen, Olivar á Ryggi og Mikkjal á Ryggi.

Og Erhardi Jacobsen um barnadagar hansara í Sørvági í sekstiárunum.

Tónleikur við Holgar, Jóan Jakku, Sámal & Elin, Kristian & Hans, Áki & Jógvan, aldemar, Eivind & Torgunn, Jákup & Ivan.

Tey bæði, Finnbjørn Hansen og Jónleyg á Løgmansbø fara at undirhalda við skemti av ymsum slag.

Høvi verður at keypa mat og drekka

Felagssangur verður við Húsorkestrinum og tann sum kemur at stýra øllum kvøldinum verður Herálvur Jacobsen úr Sørvági.

Við hesum góðu fólkum er lagt upp til eitt sera gott og skemtiligt kvøld í Bygdarhúsinum. Tað kostar 150 krónur, og atgongd er avmarkað.

Innkomin peningur fer óskerdur til »í menniskjum góður tokki«, sigur Kvinnubólkurin í Vágum og Valdemar, Jens Eli og Oddmar.